Tannlækna-
felagið



1991–2011

# Kariesskráseting

## Børn frá 5–15 ár

Heilsumálaráðið 2012



Kariesskráseting 1991-2011
– eitt 20 ára skeið

# Innihaldsyvirlit


Inngangur . . . . . . . . . . Síða 4

Hugleiðingar . . . . . . . . . . Síða 5

Mynd I Barnatenn í FO 1991–2011 . . . . . . . . . . Síða 6

Mynd II Torleikastøðið í FO 1991-2011, barnatenn . . . . . . . . . . Síða 7

Mynd III Vaksnamannatenn 1991–2011 . . . . . . . . . . Síða 8

Mynd IV Torleikastøðið í FO 1991–2011, vaksnam.tenn . . . . . . . . . . Síða 9

Mynd V Uppbýti av tannsjúkum í FO 1991–2011, barnatenn . . . . . . . . . . Síða 10

Mynd VI Uppbýti av tannsjúkum í FO 1991–2011, vaksnam.tenn . . . . . . . . . . Síða 11

Kariesstøðan kring landið . . . . . . . . . . Síða 12

Mynd VII Barnatenn, kariesstøðan kring landið 1991–2011 . . . . . . . . . . Síða 12

Mynd VIII Vaksnamannatenn, kariesstøðan kring landið 1991–2011 . . . . . . . . . . Síða 13

Samandráttur . . . . . . . . . . Síða 14

Orðafrágreiðing . . . . . . . . . . Síða 15

# Inngangur

Í 2011 vóru 20 ár liðin síðani føroyskir tannlæknar fóru undir skipaða skráseting av tannheilsuni hjá børnum og ungum í aldrinum 0–15 ár.

Um tølini fyri 1991 skrivaði táverandi lógarnevnd m.a. :

Niðurstøðan er:

1. Lógin um barnatannarøkt eigur skjótast at verða broytt til at umfata øll børn frá 0 til 16 ár. Soleiðis at smábørnini vera tikin uppí barnatannarøktina stigvís tey fyrstu 3 til 4 árini.

2. Føroysku tannlæknarnir mugu leggja enn størri dent á fyribyrging. Teir hava útbúgving og møguleikar fyri at gera enn meira við hetta og harvið gera færri umvælingar. Hetta er tó treytað av, at lógin um barnatannarøkt fevnir um smábørnini eisini.

3. Føroysk børn skulu eftir fáum árum hava líka góðar tenn, sum børnini í okkara grannalondum. WHO hevur fyri fáum árum síðani sett sær eitt mál: „Heilsa fyri øll ár 2000.“ Skulu Føroyar – eins og flestu lond í heiminum – taka undir við hesum málsetningi – og røkka hann í samband við tannheilsuna hjá føroysku børnum, mugu lands- og kommunalpolitikkarar – sum skjótast – gera teir lógar – og fíggjarkarmar, sum eru neyðugir fyri at røkka hesum máli.

Nú 20 ár seinni kann staðfestast, at nógv er hent:

1. Lógin um barna- og ungdómstannrøkt í aldrinum 0–15 ár kom í gildi í 1998.
2. Upplýsing um tannrøkt og fyribyrging er náttúrligur og týdningarmikil partur av barnatannrøktini í dag.
3. Út frá hagtølunum kann staðfestast, at Føroyar ikki longur er eftirbátur á hesum øki. Síðani 1991 er tannheilsan hjá børnunum batnað sera nógv.



# Hugleiðingar hjá núverandi SEF nevnd í 2012:

## *„Frískar tenn alt lívið“*

… er endamálið við at brúka nógva tíð, orku og ressursir uppá tannrøkt.
Tá tey ungu fara úr barnatannrøktini, eftir lógini sum 15 ára gomul, tó summa staðni sum 17 ára gomul, hevur ein góður triðingur av teimum púra frískar tenn. Hetta er gott, men gloymast skal ikki, at tveir triðingar hava havt brendar tenn, fylgjandi fingið plombur, ið síðani skulu haldast viðlíka alt lívið. Hetta er ikki nøktandi og arbeiðast má fram ímóti, at enn fleiri varðveita frískar tenn alt lívið.

### Frískar barnatenn

| barnatenn | 1991 | 2011 |
|---|---|---|
| 5 ára gomul | 29% | 62% |
| 7 ára gomul | 9% | 42% |

### Frískar vaksnamannatenn

| vaksnamannatenn | 1991 | 2011 |
|---|---|---|
| 7 ára gomul | 62% | 95% |
| 12 ára gomul | 12% | 58% |
| 15 ára gomul | 4% | 29,6% |

Talið av børnum við frískum tonnum er alsamt vaksandi. Út frá taltalvuni sæst, at av teimum 12 ára gomlu børnunum høvdu 58% frískar tenn í 2011, í mun til 12% í 1991.

Í seinastu SEF frágreiðing, 2008–2009, varð sagt frá norðurlendskari kanning, sum varð kunngjørd sept 2010. Hendan vísti, at føroysku 12 ára gomlu hava tær triðbestu tenninar í norðanlondum.

Her má tó nevnast, at í Danmark høvdu 70% av 12 ára gomlu børnunum púra frískar tenn, mótvegis 53% av okkara børnum.

Samanumtikið er framvegis rúm fyri at verða enn betri.

## Mynd I

Barnatenn í FO 1991 til 2011
def-s* 5 og 7 ára gomul
S (skaddar tannflatur)




**Mynd I** vísir def-s virðini* (landsmeðaltøl) hjá 5- og 7- ára gomlum í Føroyum frá 1991 til 2011.

Hjá 5 og 7 ára gomlum er talið av holum minkað við 2/3 frá 1991 til 2011.

d - brendar flatur
e - trektar tenn (5 flatur)
f - fyltar/plomberaðar tenn
s - flatur „surfaces“

*sí orðafrágreiðing á síðu 15.

## Mynd II

Torleikastøðið* barnatenn
5 og 7 ára gomul, 1991–2011




**Mynd II** Avmyndar „torleikastøðið“,* tvs hvussu nógvar barnatenn eru í ávikavíst:

Støði 1 = frískar tenn – víst við upptrektum linjum.
Støði 3+4 = álvarsligt karies – víst við stiplaðum linjum.

Okkara mál er, at upptrektu linjurnar skulu liggja so høgt sum gjørligt og tær stiplaðu linjurnar so lágt sum gjørligt.

Hetta er eisini rákið, tá hugt verður at talvuni omanfyri.

Børn við frískum barnatonnum er støðugt hækkandi:
- 5 ára gomul hækkaðu frá umleið 29% í 1991 upp í 62% í 2011.
- 7 ára gomul frá umleið 9% í 1991 upp í 42% í 2011.

Børn við álvarsligum karies í barnatonnum, er harafturímóti støðugt minkandi:
- 5 ára gomlu eru minkaði frá 53% í 1991 niður í 25% í 2011.
- 7 ára gomlu frá 82% í 1991 niður í 49% í 2011.

*sí orðafrágreiðing á síðu 15.

**Mynd III**
Vaksnamannatenn 1991–2011
DMF-S* 7, 12 og 15 ára gomul
S (skaddar tannflatur)




**Mynd III** vísir DMFS virðini* (Landsmeðaltøl) hjá 7-, 12- og 15 ára gomlum børnum í Føroyum frá 1991 til 2011.

Myndin vísir, at talið av brendum tonnum er minkað nógv fyri 7, 12 og 15 ára gomul. Frá 1991 til 1997 skjótt, síðani spakuligari, tó framhaldandi rætta vegin.

D brendar flatur
M trektar tenn (5 flatur)
F fyltar/plomberaðar tenn
S flatur „surfaces“

*sí orðafrágreiðing á síðu 15.

## Mynd IV

Torleikastøðið* vaksnamannatenn
7, 12 og 15 ára gomul, 1991–2011




**Mynd IV** Avmyndar "torleikastøðið",* tvs hvussu nógvar vaksnamannatenn eru í ávikavíst:

Støði 1 = frískar tenn – víst við upptrektum linjum.
Støði 3+4 = álvarsligt karies – víst við stiplaðum linjum.

Ynskiligt er, at upptrektu linjurnar liggja so høgt sum gjørligt og tær stiplaðu linjurnar so lágt sum gjørligt. Hetta er eisini rákið, tá hugt verður at talvuni omanfyri.

Børn við frískum vaksnamannatonnum er støðugt hækkandi:

- 7 ára gomlu hækkað frá umleið 62% í 1991 upp í 95% í 2011.
- 12 ára gomlu frá umleið 12% í 1991 upp í 58% í 2011.
- 15 ára gomlu er er støði 1 vaksið frá umleið 4% til umleið 30% frá 1991 til 2011.

Børn við álvarsligum karies í vaksnamannatonnum, er harafturímóti støðugt minkandi:

- 7 ára gomlu eru minkaði frá 8,5%í 1991 niður í 0,5% í 2011.
- 12 ára gomlu frá 62% í 1991 niður í 24% í 2011.
- 15 ára gomlu frá 75% í 1991niður í 49% í 2011.

Ein triðingur av teim 15 ára gomlu fóru úr barnatannrøktini við púra frískum tonnum í 2011.

*sí orðafrágreiðing á síðu 15.



## Mynd V

Uppbýti av tannsjúkum í FO 1991–2011
Barnatenn 5 og 7 ára gomul
S (skaddar tannflatur)




**Mynd V** vísir def-s virðini.*
Myndin vísir at talið av skaddum barnatonnum er í støðugari minking.

*sí orðafrágreiðing á síðu 15.

## Mynd VI

Uppbýti av tannsjúkum í FO 1991–2011
Vaksnamannatenn 7, 12 og 15 ára gomul
S (skaddar tannflatur)




**Mynd VI** vísir DMFS virðini* (fyri vaksnamannatenn) hjá 7, 12 og 15 ára gomlum børnum, býtt upp eftir brendum -, fyltum - og trektum tonnum (flatum).

Myndin vísir, at talið av brendum tonnum er støðugt minkandi. Bæði fyri 12 og 15 ára gomul er ein stórur bati frá 1991 til 2011.

*sí orðafrágreiðing á síðu 15.

# Kariesstøðan kring landið

**Mynd VII**
Barnatenn 7 ára gomul
def-s*
virðir frá 1991–2011
Uppbýtt í postøkir
S (skaddar tannflatur)




**Mynd VII** vísir kariesstøðuna á barnatonnum hjá 7 ára gomlum í teimum ymisku kommununum árini 1991, 1996, 2001, 2006, 2010 og 2011.

Landsmeðaltølini eru ytst vinstrumegin, síðani eru kommunurnar settar upp eftir postnummari.

*sí orðafrágreiðing á síðu 15.

## Mynd VIII

Vaksnamannatenn 12 ára gomul
DMF-S*
virðir frá 1991–2011
Uppbýtt í postøkir
S (skaddar tannflatur)

D-S brendar tenn
F-S fyltar/plomberaðar tenn
E-S trektar tenn




**Mynd VIII** vísir kariesstøðuna á vaksnamannatonnum hjá 12 ára gomlum børnum í teimum ymisku kommununum sett upp eftir postnummari árini 1991, 1996, 2001, 2006, 2010 og 2011.

Landsmeðaltølini eru ytst vinstrumegin, síðani eru kommunurnar settar upp eftir postnummari.

*sí orðafrágreiðing á síðu 15.

# Samandráttur og tilmæli

Í 1991 vóru tannlæknarnir í Føroyum samdir um, at fara undir at skráseta øll skúlabørn fyri tannsjúkur eftir altjóða reglum hjá WHO, fyri at fáa nágreinilig tøl  at lýsa tannheilsustøðuna hjá føroyskum børnum. Við hesum hagtølum bar til, at fáa kommunal- og landspolitikarar at taka undir við skipaðari regluligari smábarnatannrøkt. Í 1998 kom løgtingslóg nr. 23 frá 6. mars 1998 um barna- og ungdómstannrøkt, ið tryggar øllum føroyskum børnum upp til 16 ár regluliga tannrøkt.

SEF nevndin mælir til at hækka ta skipaðu, lógarbundnu barnatannrøktina til 18 ár, sum er áleið tað sama, sum er galdandi í grannalondum okkara.

Út frá SEF skrásetingini kann staðfestast, at tannheilsan millum føroysku børnini er nógv batnað.  Kortini kann tannheilsan batna meira enn, serliga er ynskiligt at betra um tølini í torleikastøðnum 3–4 (serliga álvarslig karies).

SEF frágreiðingin, ið er umbiðin av Heilsumálaráðnum, verður givin út annað hvørt ár.

Juni 2012

Sigrid Arge  og Unn Jakobsen

# Orðafrágreiðing

**SEF** (**S**jónlig **E**yðkennis **F**yribrygdi): Skráseting av tonnum, tannflatum, brendum tonnum, plombum, trektum tonnum/ tannflatum, vantandi tonnum, bitfeilum,tannhaldssjúkum v.m.

**DMFS /defs:** (stórir stavir = vaksnamanntenn / lítlir stavir = barnatenn).
**D/d:** „decayed" = brendar tannflatur.
**M/e:** „missing" / „extracted" = trektar tenn / tannflatur.
**F/f:** „filled" = plomberaðar tannflatur.
**S/s:** „surfaces" = flatur.

DMF**T**/def**t**: „tooth" = tonn (og ikki bara flata).

**Torleikastøði:** (á donskum sværhedszoner) = % talið av børnum, sum hava:
Støði 1 = frískar tenn (ongar brendar tenn).
Støði 2 = brent í tyggiflatum á jakslum og kinntonnum.
Støði 3 = brent millum jakslarnar og kinntenninar.
Støði 4 = Hol í framtonnum og glattflatum á jakslum og/ella kinntonnum.

Barnatenninar eru 20 í tali og hava tilsamans 88 tannflatur.
Vaksnamannatenninar eru 28 í tali og hava tilsamans 128 tannflatur.
(vísdómsjakslarnir verða ikki taldir við).

**SCOR: S**undhedsstyrelsens **C**entrale **O**dontologiske **R**egister.
**OCR: O**ptical **C**haracter **R**ecognition.

**WHO: W**orld **H**ealth **O**rganisation: Heimsheilsustovnurin undir ST.

Keldur:
Føroysk SEF-tøl 1991–2011.
Landsfólkayvirlitið 2008–2011.
Postverk Føroya: Postøkir/postnummur.
Nordisk kvalitetsmåling i sundhedsvæsenet, TemaNorden 2010:572.

Lógarverk:
Løgtingslóg nr. 23 frá 6. mars 1998 um barna- og ungdómstannrøkt.



SENDISTOVAN

Heilsumálaráðið 2012